Ávaring við stórum Á til lista E

# Silvurfatið hjá Høgna Hoydal og hansara leigusveinum

**Sigvald Zachariasen**
*Valevni fyri Sjálvstýrisflokkin í Norðurstreymoy*



Sjálvstýri stig fyri stig má til. Tí fara vit ov brádliga fram, so eri eg bangin fyri, at mangur fer at standa sum ryssa yvir deyðum fyli, og spyrja seg sjálvan, "hvat hendi her?" Og síðani vera ógvuliga hørm um, at alt nú ikki bleiv, sum vit annars høvdu glett okkum so ómetaliga nógv til.

"Endamálið" eru vit so sera samd um. Men bert við samhaldni og virðing hvør fyri øðrum, koma vit á mál. Ikki í sjálvdrátti og útspilling hvørja ferð eitt høvi er til staðar. Vit eiga heldur at fegnast um, at tað nú, í mun til bara fyri 20-30 árum síðani, styttist ímillum stigini. Hetta tí, at vinnan í dag hevur fleiri bein at standa á.

**Ein drepandi virus**
Ein kend søga er um eitt høvd á einum silvurfati, og verður søgan um hetta silvurfat mangan tikin fram sum dømi upp ígjøgnum tíðirnar.

Og passandi kundi verið at samanlíkna hesa søgu við framferðarháttin hjá tjóðveldisflokkinum fram til komandi val.

Teir koyra so kraftiga og á ein so ósakligan og ófólkaligan hátt síni sjónarmið ígjøgnum, bæði her á landi, og á danatingi, at tað fer sum ein drepandi virus ígjøgnum alla sjálvstýrisrørslu og sjálvstýristilgongd í Føroyum.

**Vegurin til málið**
Nú er hesin framferðarháttur ein beinleiðis og ókeypis løgtingsmeiriluti til sambandsflokkarnar leveraður á einum "silvurfati" av Høgna sjálvum, formanni fyri Tjóveldisflokkin. Men tað tykist, at nógv eru villleidd til at rætta honum eina hjálpandi hond, so at hann skal orka at bera hetta so sera gamla, dýrabara og tunga fat. Enn einaferð: "málið" í sjálvum sær eru vit samd um - Føroyskt sjálvstýrið - eingin ivi um tað, men vegurin til málið er ikki tann, ið Tjóðveldisflokkurin gongur á í løtuni. Og vegurin er so yvirhøvur ikki tann, sum Javnaðarflokkurin gongur á.

**Sjálvstýrisflokkurin einasta trygd**
Havi ført tað fram fyrr, at Sjálvstýrisflokkurin hevur til allar tíðir verið borgan fyri, at ongin samfelagsbólkur er dottin burtur ímillum í nakrari samgongu, vit hava verið við í. Onkur kallar flokkin fyri kittið, klípið o.s.fr. Men set ein rút í uttan kit, ella laga ein garð uttan klípi, hvat verður úrslitið? Smíða ein bát uttan ein vælklinkaðan bátaseym, um hann enn er lítil, hvat verður úrslitið? Jú, skútan dettur sundur, ongin ivi um tað. Ein sterkur Sjálvstýrisflokkur er okkara einasta trygd fyri, at samfelagsskútan Føroyar trygt kann sigla fram til fullveldiskajkantin við øllum samfelagsbólkum í lastini, hóast tað mangan brýtur í bæði borð. Tá kunnu fólk so velja, um tey fara í land ella hvønn veg skútan skal fara.

Set KROSS við lista D.

# Føroyingar hitta løgmann

**Sune Jacobsen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Vágum*



Rindar landskassin fult út fyri sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum, so rindar Føroya Sparikassi krígspensiónina.

Løgmaður ferðast sum kunnugt runt landið fyri at møta føroyingum, og á hesum fundum er høvi hjá fundarfólki at seta løgmanni spurningar. Í síðstu viku var løgmaður í Sandavági. Eitt av fundarfólkunum spurdi løgmann: " Er tað satt, løgmaður, at føroyingar fáa viðgerð ókeypis á Ríkissjúkrahúsinum? Tá eg spyrji hetta, so er tað tí, at hetta ofta verður sagt."

**Rinda sjálvi**
Til henda spurning svaraði løgmaður:"Vit gjalda fult út sjálvi fyri ta viðgerð, sum føroyingar fáa á Ríkissjúkrahúsinum." Her sigur løgmaður ósatt. Spurningurin um Ríkissjúkrahúsið er uppi og vendir fyri hvørt løgtingsval, og tí hava frægir sambandsmenn kannað hendan spurning, og úrslitið er stutt og greitt, at sjúkraviðgerðin á Ríkissjúkrahúsinum er ókeypis, ja, hon gevur enntá avlop til føroyska landskassan.

**Refusiónsskipanin**
Tá ið gamla refusiónsskipanin í 1988 varð umløgd til ein blokkstuðul, varð blokkurin latin føroyingum sjálvum at umsita, soleiðis at skilja, at vit kundu nýta upphæddina í blokkinum, sum vit vildu og til annað, enn hann var ætlaður til. Soleiðis kundu vit t.d. nýta tann pening,sum var ætlaður til sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum til eitt nú vegir, tunlar ella hvat tað nú kundi vera.

**5% eru ætlað til sjúkraviðgerð**
Men grundarlagið, blokkurin varð útroknaður eftir, var gamla refusiónskipanin. Sambært upplýsingum frá Ríkisumboðnum var refusiónin til sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum uml. 5% av samlaðu refusiónsupphæddini. Verandi samgonga hevur t.d. samráðst við donsku stjórnina um at hækka samlaðu veitingina, meðan teir sjálvir sita, men grundarlagið er ongantíð broytt. Tí er tað rætt at nýta hesi somu 5%`ini, tá ið metast skal um, hvussu nógv vit fáa frá dønum til sjúkraviðgerð uttanlanda, og tá einamest á Ríkissjúkrahúsinum

Sí talvu!

Soleiðis hava vit í veruleikanum, síðani vit fingu blokkin, fingið 93 mió. kr. meira til sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum fram til árslok 1999, enn vit hava brúkt.

Segði so løgmaður ósatt? Tað stendur upp til lesaran at meta um. Einasta próvførsla fyri at løgmaður hevur nortið við henda pening er: Peningurin til viðgerðina verður sendur úr statskassanum upp í landskassan. Síðani verður hann sendur niður aftur í statskassan,sum gjald fyri tænastur á Ríkissjúkrahúsinum.

Samanbera vit hetta við tað, sum hendir við krígspensiónini, so er mannagongdin henda. Pensiónin verður send frá Arbejdsskadestyrelsen til Føroya Sparikassa. Sparikassin sendir so krígspensiónina víðari til krígspensionistin. Sjálvandi heldur stjórin í Føroya Sparikassa ikki, at hann hevur goldið krígspensiónina, men tað heldur løgmaður.

**Avlop upp á 93 mió.kr.**
Sambært upplýsingum frá Fíggjarmálastýrinum hava upphæddirnar verið hesar í mió.kr.:

| | 1988 | 1989 | 1990 | 1991 | 1992 | 1993 | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Blokkur | 480 | 516 | 752 | 784 | 789 | 814 | 817 | 852 | 860 | 886 | 908 | 933 |
| Ætlað Ríkissjúkrah | 24 | 26 | 38 | 39 | 39 | 41 | 41 | 43 | 43 | 44 | 45 | 47 |
| Nýtt til Ríkissjúkrah | 22 | 23 | 24 | 26 | 27 | 32 | 34 | 33 | 34 | 35 | 37 | 50 |
| Avlop | 2 | 3 | 14 | 13 | 12 | 9 | 7 | 10 | 9 | 9 | 8 | -3 |
| Samlað avlop frá blokkinum av útreiðslum, ætlaðar til viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum | | | | | | | | | | | | 93 |

# Best er at gevast, meðan leikur er góður !

**Absalon Matras**
*valevni Sambandsfloksins*



Soleiðis tók Finnbogi Ísakson til, tá ið hann boðaði frá, at hann ikki stillar upp til løgtingsvalið.

Tað undrar helst mong, at fleiri framstandandi tjóðveldismenn mynstra av, nú formaður teirra boðar frá, at loysingin kann náast í komandi valskeiði.

Tað er einki at ivast í, at skal ætlan Tjóðveldisfloksins fremjast í verki, so førir hon afturstig við sær fyri land og fólk.

Um vit ikki høvdu blokkin, uppá eina slaka milliard um árið, hevði Landskassin havt stórt hall, á hvørjum ári, seinastu árini, hóast tíðirnar eru góðar. Eingin peningur var spardur upp, men skuldin var vaksin.

Sum skilst, ætlar Tjóðveldisflokkurin at avrigga heimastýrislógina í komandi valskeiði. Tá ið tað er gjørt, kemur eingin króna afturat úr Danmark.

Vit mugu ásanna, at vit í dag ikki hava ein sjálvberandi búskap. Tað fara vit heldur ikki at hava í komandi valskeiði, og tí kemst ikki uttanum, at politikkur Tjóðveldisfloksins fer at geva stórar trupulleikar.

Valevni Tjóðveldisflokksins greiða í fjølmiðlunum frá øllum tí, ið flokkur teirra ætlar at fremja: Skúlaverkið, sjúkrahúsverkið, eldrarøktin, barnaansing og mangt annað. Alt hetta kostar hópin av peningi.

Samstundis vilja tey hava loysing. Hetta kostar samfelagnum eina milliard kr. um árið. 366 mió. kr. eru longu skornar burtur. Ein og hvør skilir, at slíkur politikkur hongur als ikki saman, men koyrir samfelagið í óføri.

**Nei til loysing – Ja til samband.**
Í ríkisfelagsskapi við Danmark er okkara land bygt upp til tað vælferðarsamfelag, vit hava í dag. Allir borgarar ynskja, at menningin heldur fram, at vælferðin verður varveitt, og at Føroyar verða eitt trygt og gott land at búgva í hjá øllum borgarum.

Sambandsflokkurin er vísur í, at hetta gerst best innanfyri karmarnar í ríkisfelagsskapinum. Men ein fyritreyt er, at vit velja fólk inn á løgting, sum vilja samstarva við hin partin av ríkinum í sátt og semju.

Vel tí eitt valevni á Sambandslistanum.



# Løgtingsvalið 2002

**Kenneth Rasmussen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



**Frælsi at velja**
Virkast skal fyri sjálvstýri so hvørt sum haldgott grundarlag er skapað. Um tað verður innanfyri ella uttanfyri ríkisfelagskapin ger fólkið av seinni.

**Hví?**
Tí at tá verður samfelagsskipanin og fíggjarliga grundarlagið tillagað so hvørt, soleiðis at vit ikki verða kollrend.

**Ungdómshús**
Fyri at betra trivnaðin hjá teimum ungu, mugu høli útvegast til ungdómshús. Her eiga landið og kommunurnar at stuðla mest møguligt.

**Hví?**
Tí at tá hava tey ungu møguleika fyri at møtast í teirra egna nærumhvørvi. Lættari verður at avmarka rúsevnismisnýtsluna og náttarkoyringin minkar.

**Leiga út skattafrítt**
Øll, sum leiga minni enn helvtina av egnum sethúsum út, skulu kunna gera hetta skattafrítt. (Norðmenn hava góðar royndir av hesum)

**Hví?**
Tí at tá fáa vit nógvar tómar kjallaraíbúðir í brúk og loysa ein stóran part av bústaðartrupulleikunum beinanvegin.

**Ansa egnum børnum**
Møguleikin at geva familjum, sum hava hug at ansa børnum sínum heima ein part av degnum, eina samsýning, eigur at verða kannaður.

**Hví?**
Tí at tá minka bíðilistarnir og tørvurin at byggja nýggjar stovnar og mamman ella pápin, sum er heima, missir ikki sambandið við arbeiðsmarknaðin.

# Økismenning!

**Svenning Borg,**
*Vágur*
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Áðrenn seinasta val fyri skjótt fýra árum síðani kom fram eitt orð, sum eitur økismenning, og var tað mest tjóðveldisflokkurin, sum bar seg fram við hesum fagra orði, sitandi samgonga tók eisini hettar orðið í samgonguskjalið.

Langt er frá orði til gerð er gamalt orðatak og so var eisini hjá hesari samgongu, og ein vánalig samgonga fyri okum suðuroyingar. Økismenning bleiv ongin, men heldur hinvegin, tað bleiv dýrari at búgva í útjagaranum, og dýrasti ferðaseðil hjá strandferðsluni er til Suðuroynna, hetta má broytast.

Okur vilja hava sama ferðaseðlaprís á øllum rutunum hjá strandfersluni.

Ígjøgnum allar tíðir hava suðuroyingar kunna tikið sítt koyrikort í Suðuroynni, men nú krevur sitandi samgonga, at skal ein suðuroyingur taka koyrikortið, so skal hann til Havnar at taka tað. Tað fara okur ongantíð at góðtaka.

Mrcc støðina løgdu teir í Havn og keyptu bygning til tað virksemið. Tað almenna átti bygning í Suðuroynni til endamálið, men her suður mátti onki koma. Oljumálastýrið løgdi teir í Havn í dýrt leiganum bygningi, eisini her kundi tað almenna leiga bygning til endamálið í Suðuroynni, men aftur her blivu okur skúgvaðir til síðis, sjálvt um alt oljuvirksemi er á leiðunum her sunnanfyri. Altso okur eru ikki partur av tí almenna Føroyum.

Hvar bleiv økismenningin av.???

Hvar bleiv økismenning arálitið av???

Eitt av tjóðveldisumboðunum lýsir soleiðis í bløðunum: Vit halda áfram.

Best er altíð at byrja fyrst, áðrenn ein kann halda áfram.

Tillukku samgongan, við tykkara avtoftingarpolitikki, men nú er tíbetur ikki nógv tíð eftir hjá tykkum í Tinganesi.

Nú er so væl í hondum og vil eg heita á suðuroyingar um at fylkast um Sambandsflokkin, veljarans trygd fyri eini frælsum vinnulívi og eini mennandi oyggj.

# Valevni glímast um talutíð

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin kl. 15 verður ein øðrvísi valfundur í ítróttarhøllini í Runavík, har valevni til løgtingsvalið skulu vinna glímingardystir fyri at vinna sær talutíð.

Nú løgtingsvalið nærkast, eru bæði bløð og heimasíður á tremur við alskyns valagni. Men tó er eisini tørvur á valfundum, har samskifti er øðrvísi og meira beinleiðis.

Talutíð er ein av høvuðstættunum á slíkum fundum, men seinnapartin leygardagin verður ítróttarhøllin í Runavík karmur um ein valfund, ið hevur meira enn bara røður at bjóða.

Tað er NSÍ, sum skip-ar fyri fundinum, har uppstillaðu flokkarnir skulu møta við fimm valevnum í part, sum skulu glímast móti hvørjum øðrum fyri at vinna sær talutíð.

Hetta fer alt samalt fram á einum serligum 16 fermetur stórum vígvølli við einari bleytari máttu, so politikararnir mugu savna tankarnar um bæði at halda sær á fótum og at glímast.

Um miðjuna hevur hvørt valevni fýra ballónir, og hvørjar ferð tvey valevni bresta saman á vígvøllinum, ræður um at bresta ballónirnar hjá mótstøðumanninum ella -kvinnuni.

Vinnarin av hesum glímingardystunum vinnur sær ein minutt av talutíð, og skal røðan haldast beinanvegin.

Tá glímingin er av, fær flokkurin við flest sigrum 10 minuttirs talutíð, nummar tvey fær 7 minuttir og nummar trý 5 minuttir. Hinir flokkarnir fáa tveir minuttir í part.

Hesin sermerkti valfundurin byrjar í ítróttarhøllini í Runavík seinnapartin leygardagin kl. 15, og kosta atgongumerkini 50 krónur. Orðstýrari er Hilmar Jan Hansen, og dómarar eru Jákup Mortensen og Jónsvein Knudsen.







